

*Eftir øllum at døma hevur tað eydnast umboðum fyri Oljumálastýrið at sannføra í hvussu er ein meiriluta í Vinnunevndini um, at tað er skilabest ikki at gera broytingar í upprunaliga uppskotinum. Her vitjar aðalstjórin í Oljumálastýrinum, Herálvur Joensen í Vinnunevndini, har formaðurin Heine O Heinesen tekur ímóti. Mynd Jens K. Vang*

# Allar Føroyar eiga at fáa lut í kolvetnisvinnuni

*-Landsstýrið eigur at skipa so fyri, at allar Føroyar fáa lut í úrtøkuni og menningini av kolvetnisvinnuni, og hetta gerst einans við, at øllum landinum verður tryggjaður lutur í og umsiting av útgerðarvinnuni, longu tá leitingarskeiðið tekur seg upp og frameftir sigur meirilutin í Vinnunevndini í álitinum til útbjóðingarlóg. Hann ávarar eisini negativu móti avleiðingunum av eini oljuvinnu, bera vit okkum ikki rætt at frá byrjan*

Jan Müller

Ein meiriluti í Vinnunevndini mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum um 1. útbjóðing óbroytt. Um somu tíð mælir ein minniluti í nevndini, sum eru umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum til at gera ta broyting, at pláss verður gjørt fyri einum almennum føroyskum oljufelag (optión), har partur tess verður 1 til 5% av loyvinum. Umboðini fyri Javnaðarflokkin mæla so eisini til at broyta standardloyvið soleiðis, at har kemur at standa, at feløg, sum fáa loyvi, skulu lata virksemi sítt ganga út frá Suðuroynni.

### Eiga at vera varug við vandar

Meirilutin í Vinnunevndini ger annars rættiliga nógv burtur úr tí ávirkan, sum ein møgulig oljuvinna kann fáa á føroyska samfelagið og sigur m.a.:

-Føroyingar hava altíð dugað væl at farið um sítt umhvørvi og hava burturav livað av náttúrunnar gávum úr bø, haga, firðum og havi. Fyri framman liggur ein møgulig oljuvinna, sum, um hon fær fótin fyri seg, fer at ávirka føroyska umhvørvið og samfelagið munandi búskaparliga, vinnuliga, mentanarliga og sosialt.

Vandi kann eisini verða fyri, at sosialu og mentanarligu broytingarnar skjótt kunna kollrenna føroysku bygdasamfeløgini eins og miðstaðarøkið. Neyv atlit eiga tí at verða tikin hesum viðvíkjandi, so at føroyingar eisini frameftir fara at kenna seg væl í egnum landi við óspiltum umhvørvi, egnum máli og egnari mentan.

Henda nýggja vinnan fær ein enda og fer ikki á sama hátt sum fiskivinnan at halda lív í sær sjálvari við skynsamari stovnsrøkt. Hon er tí ein stór avbjóðing fyri eitt samfelag, sum í øldir hevur livað av náttúrunnar gávum úr einum óspiltum umhvørvi.

Vandi er í hvørji vælferð. Leypa vit fram av og lata kolvetnisvinnuna og pengavaldið fara avstað við okkum, kann hetta kollrenna føroyska samfelagið, soleiðis at tað, tá ið ævintýrið er av, ikki er at kenna aftur sum fiskivinnusamfelag og kanska fær ilt við at fóta sær aftur sum slíkt sigur samgongumeirilutin í nevndini.

Hann heldur ananrs, at landsstýrið í síni umsiting eigur at leggja dent á, at kapping er millum oljufeløgini. Samstundis eiga vit at ansa eftir, hvørjar íløgur vit gera, soleiðis at hesar ikki verða burturspiltar í kapping millum økini.

Víðari verður víst á, at tað í fíggjarlógaruppskotinum fyri ár 2000 sæst, at keyp av vørum og tænastum kosta landskassanum 550 mió. kr. árliga, og liggur dastið av hesi vinnu í miðstaðarøkinum. Sjálvsagt er, at júst hendan vinnan eisini fer at veita vørur og tænastur til oljuvinnuna uttan mun til, hvar í landinum vinnan setir seg niður verkliga.

-Landsstýrið eigur at skipa so fyri, at allar Føroyar fáa lut í úrtøkuni og menningini av kolvetnisvinnuni, og hetta gerst einans við, at øllum landinum verður tryggjaður lutur í og umsiting av útgerðarvinnuni, longu tá leitingarskeiðið tekur seg upp og frameftir sigur meirilutin og heldur fram:

-Tann tøkniliga menningin, ið stendst av hesi nýggju vinnu, eigur at koma føroyska framtíðarsamfelagnum til gagns til at byggja upp eitt vitanarstøði, ið nýtast kann í avleiddum vinnum frameftir, eins og áleggjast kann fremmanda kapitalinum at byggja út og framleiða mest møguligan part av síni útgerð í Føroyum.

Vit eiga somuleiðis at brúka neyðugan pening til gransking, vørumenning og annað mennandi arbeiði, ið kann vera við til at stuðla upp undir og skapa karmar um framtíðarrættaðar vinnur, ið eru vitanartungar og geva nógv avkast til føroyska samfelagið. Tað vil siga, at føroyska samfelagið (fólkið) er ført fyri at taka kappingina upp, tá oljan ikki er her meir.

Í álitinum frá Vinnunevndini, sum viðgjørdi uppskotið til løgtingslóg um kolvetninsvirksemi, verður upplýst, at oljufeløgini, ið hendan nevndin hevði vitjað, mæltu frá at seta teimum ov nógvar treytir, tí tað kom av sær sjálvum. Harafturímóti vóru stórtingslimir í Noregi ikki í iva um, at rætt er at seta treytir, sum innan rímilig mørk kunnu stýra kolvetnisvirkseminum út á so stóran part av landinum sum møguligt og samstundis kunna ansa eftir, at nýggja virksemið ikki kollrennir annað virksemi.

Ein samd vinnunevnd mælir tí til, at landsstýrið í øllum avgerðum sínum frameftir tekur neyðug fyrilit, grundaði á omanfyri standandi viðmerkingar, og at infrastrukturin verður skipaður soleiðis, at virksemið av oljuvinnuni kemur at gagna øllum landinum.

Vinnunevndin heldur eisini, at landsstýrið eigur at koma við ítøkiligum uppskoti um, hvussu fíggjarliga avkastið av oljuvinnuni verður umsitið.

Meirilutin í nevndini (Heini O. Heinesen, Jógvan á Lakjuni, Jákup Suni Joensen og Jákup Sverri Kass) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

### Alment oljufelag og útgerðarhavn

Ein minniluti í nevndini (Alfred Olsen, Henrik Old og Katrin D. Jakobsen) tekur undir við uppskotinum, men mælir Løgtinginum til at broyta uppskotið soleiðis, at tað verður álagt landsstýrismanninum at tryggja, at eitt møguligt framtíðar alment føroyskt oljufelag skal kunna fáa ein part í loyvinum.

Samsvarandi hesum setir hesin minnilutin fram soljóðandi broytingaruppskot: „Í loyvum sambært stk. 1 skal landsstýrismaðurin treyta sær, at eitt møguligt alment føroyskt oljufelag skal kunna fáa ein part í loyvinum (optión), sum er millum 1 og 5%.“

Ein annar minniluti í nevndini (Henrik Old og Katrin D. Jakobsen) mælir harumframt Løgtinginum til at broyta uppskotið soleiðis, at tað í standardloyvinum verður ásett, at virksemið hjá loyvishavaranum í Føroyum skal ganga úr Suðuroy. Hann sigur m.a.:

-Undir 1. viðgerð boðaði framsøgumaður Javnaðarfloksins frá, at hann ikki kundi góðtaka, at vinnan einsamøll skuldi taka avgerðina um útgerðarstøðir, tí henda avgerð fær stórar samfelagsligar avleiðingar. Framsøgumaðurin boðaði samstundis frá, at minnilutin vildi gera tað, sum var neyðugt til tess, at henda avgerð gjørdist politisk.

Ein ávís miðsavnan av virksemi og her serstakliga innan umsiting og tænastuvinnu hevur altíð verið og fer altíð at verða. Men til tíðir er henda miðsavnan virknari enn vanligt, og seinastu 20 árini hevur hon rættiliga tikið dik á seg.

Nú alt meira verður tikið upp og mett út frá marknaðarbúskaparligum treytum, so tykist tað vera munandi torførari at grundgeva fyri at leggja vinnuvirksemi, almenna umsiting og tænastuvinnur í útjaðaranum. Hetta er bara ein av nógvu veruleikunum í gongdini seinastu árini.

Minnilutin hevur fyri drúgvari tíð síðan ásannað, at gongdin, sum nú er, um ikki alt ov langa tíð, verður trupul fyri ikki at siga ógjørlig at venda. Fólkatalið í ávísum økjum er í stórari minking, stórt burðarhall er, og ungdómurin vendir ikki aftur eftir lokna útbúgving.

Skal henda gongd vendast, so er neyðugt, at hesi øki umframt vanligt virksemi eisini fáa arbeiðspláss, sum krevja ymiskar førleikar. Førleikar, sum eisini útjaðaraungdómurin hevur nomið sær, men har arbeiðsplássini, ið seta hesi førleikakrøv, í løtini eru heldur sparsom í útjaðarum. Stóri vøksturin innan almenna umsiting seinastu árini hevur so dyggiliga undirstrikað hetta.

Minnilutin tekur hesar trupulleikar í størsta álvara, og heldur hann, at tað eigur at verða tikin ein politisk avgerð um, hvar framtíðar oljuvirksemið skal liggja. Hetta eigur ikki at verða latið upp í hendurnar á útlendskum kapitali at gera av, tí avgerðin hevur í sera stóran mun samfelagsligar avleiðingar, alt eftir hvar henda vinna fær sína høvuðsmiðstøð.

Samsvarandi hesum setir hesin minnilutin fram broytingaruppskotum, at „Leitingar- og framleiðsluvirksemi úr Føroyum, herundir m.a. við útgerðarstøðum, skal ganga úr Suðuroy“.



## Hygg & Hoyr

Fríggjadagur 28. januar

# Prime, World ella bæði

*Fólk flest munnu kenna yvirskriftina, men hvat hevur hon við dagin í dag at gera? Jú, liðin eru nú fimm ár síðani at hetta rokið tók seg upp*




Jákup Mørk

Í hesum døgum heldur BBC Prime fimm ára føðingardag, og er tað í hesum sambandi, at yvirskriftin er funnin fram aftur.

Ruðulleikin, sum tá valdaði tóktist fyri mongum at vera øgiligur, tó at onnur helst hildu, at málið um sjónvarpsrásirnar var blást nakað upp.

Fyrst varð bert World sent, síðani bert Prime, aftur til World. Eingin semja tóktist í eygsjón, men brádliga kom onkur við hugskotinum um at víðka talið av rásum, og tá bar til.

Tískil kunnu vit í dag velja, um vit vilja hava Prime, World,bæði…ella hvørki.

**Væl umtókt**

Tað var nú ikki fimm ára gamla ruðuleikan hetta skuldi snúgva seg um, men eg kundi tó ikki bara mær fyri at vera eitt sindur afturlítandi í hesum sambandi.

BBC hevur síðani Prime kom til, víðkað alt meira um sendiøkið, og fyri stuttum kom hyggjaratalið upp um tær átta milliónirnar.

Hyggjast kann eftir rásini úr Føroyum til Suðurafrika, og komandi tíðina hevur leiðslan ætlanir um at víðka enn meira um hyggjaraskaran, so hesin eisini kann fevna um Ísrael og Miðeystur.

At rásin er væl umtókt tykist ikki at vera nakað ivamál, og m.a. kunnu bretarnir breggja sær av, at teir eftir bert átta mánaðum í Suðurafrika, eru komnir á eitt 8. pláss á listanum fyri best umtóktu sjónvarpsrásirnar.

Sambært Wayne Dunsford, ið er leiðari fyri BBC rásirnar, hevur BBC ongar ætlanir um at slaka, men vilja tvørtur byggja víðari á menningina, soleiðis at BBC eisini kann vera við til at mynda fjølmiðlaøkið, nú vit eru farin um gáttina til nýggju øldina.

Í hesum sambandi verður arbeitt við at skapa ein nýggjan samleika fyri støðina, men hvat hetta inniber, vita vit tó ikki.

Ivaleyst er tó, at BBC Prime eisini fer at verða sent tey fimm komandi árini, og helst nakað væl longri enn tað.

## ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Kongadótturin í Nólsoy



Annika Joensen, setursskrivari, skrivar

Ólavur Rasmussen var í Nólsoy í heyst, og tað kom ein stak hunalig sending burturúr, sum varð send sunnukvøldið. Í sendingini vóru bæði sagnir og nútíðar søgur fortaldar við einum glimti í eyganum. Har var onki uppgjørt, søgurnar komu soleiðis tilvildarliga hvør um aðra, uttan at tað varð fokuserað uppá vert ella teknikk. Hetta fær innsløgini at standa nógv sterkari.

Eg havi altíð hoyrt, at nólsoyingar eru eitt serligt fólkaslag, og aftaná sendingina haldi eg, at tað man vera nakað um tað. Munnu tað vera fleiri bygdir í Føroyum, sum hava so nógv listarfólk av ymsum slag?

Øll kenna bøkurnar hjá Emil Thomsen, men tað munnu vera fleiri við mær, sum ikki vistu um knívarnir og stólarnar. Tað er eitt óvanligt hugflog og tol, sum skal til at gera so nógvar einastandandi vakrar og sjáldsamar lutir. Eg vóni, hann einaferð fær gjørt stólin við Evu eisini.

Uppskriftin til Fredrik var tíbetur við í sendingini, tí er tað nakað, sum er tiltikið um Nólsoy, so er tað løgurin, sum sigst virka betur, enn hann smakkar. Spell at hoyra, at traditiónin er um at doyggja út, men tað gongur væl við Fredrik, sum við øllum øðrum — nýggjar tíðir, nýggir vanar.

Eg kann ikki annað enn taka undir við, at tað hevði verið stuttligt, um handan 300 ára gamla hurðin í Gortrastovu hevði kunna tosað. Hon hevði helst kunna sagt frá nógv fleiri stuttligum og onkrum syrgiligum søgum úr Nólsoy.

Sendingarnar hjá Ólavi Rasmussen eru altíð áhugaverdar, og tað er spell fyri SVF, at hann hevur sagt upp. Gott hjá hvalbingum, sjálvandi, men spell fyri hyggjarnar hjá SVF kring landið.

**Lindin og Rás 2**

Komandi Hvalbiarprestur fekk meg at hugsa um nýggju útvarpsrásina Lindina, sum fór at senda í farnu viku. Tann gongdin sum hevur verið í londunum kring okkum í nógv ár er eisini komin til Føroya. Áhugabólkar, feløg og fyritøkur fáa sær sína egnu sendirás, har tey kunnu gera tær sendingar, tey halda tørvur er á. Tað kann t.d.vera talan um eina ávísan átrúnaðarligan boðskap, sum við Lindini. Á Rás 2 veit eg ikki rættiliga, hvat beinleiðis endamálið við støðini er, men countrytónleikur sveimar út úr hátalarunum, hvørja ferð eg seti á Rás 2, og tað kann tulkast sum um ÚF ikki hevur nóg mikið av hesum slagi av tónleiki.

Munurin á einum almennum stovni og einum privatum felag er nettup frælsið til at senda tað, tær lystir, so leingi tú ikki brýtur lógina. Tað merkir samstundis, at málbólkurin helst verður væl minni enn tann hjá tí almenna stovninum, sum hevur skyldu at gera sendingar til og fyri øll. Sendingarnar í Lindini og í Rás 2 siga ikki mær nógv, men tað er eisini í lagi. Tey senda tað, tey vilja, og eg havi frælsið at lata vera við at lurta.

Tað havi eg eisini, tá talan er um ÚF ella SVF, men har vænti eg mær nakað meira. Tey hava eina beinleiðis skyldu at geva mær nakað fyri síggjara- og lurtaragjaldið, tað hava Lindin og Rás 2 ikki.

**Tey 10 boðini**

Seinasta sendingin hjá Armgarð Arge um tey tíggju boðini var í farnu viku. Slíkar sendingar fáa vit ongantíð ov nógvar av eftir mínum tykki. Tað er frískligt at hoyra evnir úr Bíbliuni viðgjørd í álvara, uttan at tað á nakran hátt verður prædikað og moraliserað. Armgarð Arge hevur megnað at víst á týdningin hjá teimum tíggju boðunum fyri fólki í dag. Við góðari hjálp frá gestum í útvarpsstovuni, tók hon fram tað áhugaverda og aktuella í hvørjum boði, og helt hon prátinum á einum meira filosofiskum enn religiøsum stigi.

**Fjølbrottur tónleikur**

Edvard Nyholm Debes hevði vitjan av feðgunum Alexi og Andrassi Sólstein í sendingini Tvey ættarlið spæla tónleik. Sendingin er altíð stuttlig at lurta eftir, tí gestirnir oftast eru virknir tónleikarar. Hesuferð var onki undantak.

Fáir føroyskir tónleikarar hava spælt so leingi og so nógv, sum Alex, og synirnir hava allir arva spæligleðina og evnini. Tað var týðuligt, at hóast Alex og Andrass hava ein felags áhuga í tónleiki, so er tað sera ymiskt, hvat slag av tónleiki teimum dámar. Í sendingini var alt frá klassiskum tónleiki til 70'ara rock spælt.

At enda í sendingini slapp triðja ættarliðið eisini uppí part. Páll, sonur Andrass, hevur eisini arva tónleikaáhugan hjá pápanum og abbanum. Hann fortaldi, at hann spælir kornet, og at honum best dámar tónleikin hjá Queen. Tað var týðuligt, at tað hevur hann bara arva frá pápanum, ikki abbanum.

**Reyði tráðurin hvørvur**

At enda noyðist eg at koma við einum hálvum hjartasuffi. Hví skulu tað knappliga vera so nógvar svenskar og enskar krimiraðsendingar í SVF? Mær dámar ónatúrliga væl hesar røðirnar, men tá fleiri koma í senn, og ikki verða sendar kvøld um kvøld, men við eini viku ímillum, so missi eg tráðin. Ber tað ikki til at hava onkran stakan film okkurt kvøldið, og so toyggja røðirnar til longur út á várið?

ÚTsjón — Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN